## Matiné við børnum úr Hvíta-russlandi

MATINÉ

Leygarmorgunin komandi kl 11:30 verður matiné í Havnar Kirkju. Hesaferð eru tað børn úr Hvítarusslandi, ið framføra tónleiku úr heimlandi sínum.

Fyri tveimum árum síðani vóru fleiri teirra her í Føroyum á dansi- og sangferð, og vóru tey so fegin um ferðina, at tey ynsktu aftur at vitja oyggjaland okkara.

Tey eru 40 børn saman við einum 10 vaksnum, harav tveimum tolkum úr vinarfelag í Danmark.

Felagið Dansifrøði, saman við góðum hjálparum, leggja ferðina í Føroyum til rættis, og skulu tey framføra fleiri staðni úti á bygd eisini.

# Tónleikavitjan úr Skotlandi

HORNTÓNLEIKUR
*Tíðindaskriv*



Vikuskiftið 5. til 9. september verður ein rættuliga sjáldsom tónleikavitjan úr Skotlandi. Tá kemur eitt av bestu hornorkestrunum í Skotlandi – Newtongrange Silver Band – til Føroya at halda konsertir.

Newtongrange Silver Band er eitt hornorkestur við somu manning sum eitt nú Havnar Hornorkestur ella Klaksvíkar Hornorkestur. Ferðin er fingin í lag í samarbeiði við SMS, og ætlanin er millum annað, at orkestrið eisini skal hava eina felags konsert saman við Havnar Hornorkestri í Norðurlandahúsinum í Havn. Tann konsertin verður fríggjadagin 6. september.

Havnar Hornorkestur hevur 100 ára jubileum tíðliga næsta ár, og orkestrið vil tí nýta hetta høvi til at byrja jubileums-konsertirnar eitt sindur tíðliga. At fáa høvi til at spæla saman við og lata føroyingar fáa møguleika at lurta eftir hornorkesturtónleiki á allarhægsta stigi halda vit vera ta bestu byrjanina uppá 100 ára hátíðarhaldið. Newtongrange Silver Band er eitt sindur eldri enn Havnar Hornorkestur – orkestrið hevur verið til síðani 1892. Tey seinastu 20 árini hevur orkestrið verið millum tey bestu í Skotlandi.

Newtongrange Silver Band spælir Championship Section í Skotlandi, og orkestrið hevur umboðað Skotland í teimum stóru kappingunum, sum bretar skipa fyri árliga millum hornorkestur har. Orkestrið hevur eisini nógvar ferðir verið við í útvarps- og sjónvarpssendingunum, og tey ferðast rættuliga nógv.

Til felags konsertina í Norðurlandahúsinum 6. september er ætlanin, at spæla ein part og at Newtongrange Silver Band skal spæla ein part av konsertini. Síðani er ætlanin, at bæði orkestrini skulu spæla saman – eitt ella tvey verk. Sum nevnt er tað sjáldsamt, at føroyingar fáa høvi til at hoyra hornorkesturtónleik á so høgum støði framførdan í Føroyum, og hetta skuldi tí verið ein kærkomin møguleiki hjá okkum at lurta eftir horntónleiki, tá hann er bestur.

Atgongumerki til konsertina við Havnar Hornorkestri og Newtongrange Silver Band í Norðurlandahúsinum fríggjakvøldið 6. september kl. 19.30 eru at fáa í forsølu í Kunningarstovunum í Havn, Fuglafirði og í Klaksvík og í Norðurlandahúsinum. Kostnaðurin er kr. 100,00.









# Bilar

Nr. 169 • hósdagur • 5. september 2002 • 76. árg.




*Jaguar tíðarritið*

# Jaguar Magazine – ger ferðafrásøgn úr Føroyum





*Bilurin teir høvdu við sær. Ein Jaguar S-Type 3.0E við leðursetrum og allari hugsandi útgerð*

**Blaðmenn frá Jaguar Magazine í Onglandi vóru herfyri á vitjan í Føroyum. Teir koyrdu koyrdu við einum nýggjum Jaguar S-Type 3.0 E. Ferðafrásøgn kemur í næsta blaðnum hjá teimum, ið kemur út í november.**

JAGUAR MAGAZINE
*Magnus Gunnarsson*

Vit í Føroyum eru so avgjørt ikki forkelaði við Jaguar bilum. Hóast tað gjørdi leiðslan í Jaguar Magazin av at gera eina ferðafrásøgn úr Føroyum. Jaguar Magazine kemur út fýra ferðir um árið, og verður sent út til Jaguar eigarar. Triggir mans vóru í ferðalagnum. Richard Robinson frá Jaguar Magazin var her saman við Andrew Ball og einum myndamanni, ið var farin heima aftur við flogfari, tá vit hittu teir á Hotel Føroyum. Teir hava ferðast kring oyggjarnar, tikið myndir og skrivað eina ferðafrásøgn til Jaguar Magazine, ið kemur út miðskeiðis í november. Vit fara at venda aftur til vitjanina, tá vit fáa blaðið frá teimum og síggja hvat teir hava fingið burturúr. Teir vóru í Norðoyggjum, Eysturoynni og vóru til dømis í Elduvík og Gjógv. Eisini vóru teir uppi á Sornfelli við bilinum. Veðrið var sera gott, meðan teir vóru her, so møguleikarnir eru góðir fyri, at talan verður um eina spennandi ferðafrásøgn.



*Jaguar hava stóran áhuga í myndum sum hesum. Hendan Jaguar Mk.I, við 6 syl. motori, keypti Robert Brockie brúktan úr Skotlandi í 1961/62*



*Útgevararnir av Jaguar Magazin, geva eisini onnur bløð út, so sum WhatCar, Autocar, Motorsport og Autosport*

### Jaguar S-Type

Jaguar S-Type kom á marknaðin í 1998. Bilurin er luksusbilur við allari útgerð, komfort og koyrieginleikum á sera høgum støði. Teir fáast við V6 ogV8 motori. Í Danmark kosta teir millum 700.000 og eina millión krónur. Bilurin, ið var her fyri Jaguar Magazine, hevði V6 motor við 238 hk. Talan er um ein 3.0 litur Ford Duratec motor. Ford eigur Jaguar bilverksmiðjuna.

Richard Robinson frá Jaguar Magazin sigur, at teir hava stóran áhuga fyri Jaguar bilum í Føroyum. So vit koma at síggja bæði gamlar og nýggjar føroyskar myndir í Jaguar Magazine.

JAGUAR

## Jaguar S-Type 3,0 E

| | |
|---|---|
| Motorur | 3,0 litur V6 24V við 238 hk |
| 0-100 km/t | 8,5 sek. |
| Bensinnýtsla | 8,4 km/l |
| Dekkstødd | 225/55-16 |
| Stødd og vekt: | |
| Longd | 486,0 cm |
| Breidd | 182,0 cm |
| Hædd | 144,0 cm |
| Eginvekt | 1600 kg |
| Viðførisrúm | 370 litrar |
| Prísur í Danmark | kr.740.000,- |